NÁM

# HEIMSMÁLINI Á FILMI

HEIMSMÁL fyri burðardyggari menning

## *Til læraran*

Aftur í ár skipar Nám fyri filmskapping við støði í Heimsmálunum hjá ST. Vinningurin er 30.000 kr.
Hesaferð skulu luttakandi filmar lýsa burðardygga umsiting av lívinum í havinum (Ocean Literacy).

23. novembur 2020 skal lidni filmurin sendast Námi. Filmurin verður sendur umvegis www.wetransfer.com til filmskapping@nam.fo.

11. desembur kl. 19.00 verða filmarnir, sum dómsnevndin hevur valt, vístir í Havnar Bio. Vinnarin verður kunngjørdur sama kvøld. Flokkurin, ið hevur gjørt hvønn eintaka filmin, hevur ókeypis atgongd og fær cola og poppkorn.

Avtalað er, at Kringvarpið sendir vinnandi filmin. Tað er umráðandi, at filmurin er gjørdur í røttum tekniskum formati, so hann kann lúka tey krøv, sum eru til sjónvarpssending. Filmarnir skulu í minsta lagi vera filmaðir í Full HD, og formatini eru nágreinað niðast í lýsingini til næmingin.
Filmarnir verða eisini lagdir á temasíðuna um heimsmálini, sum er á www.snar.fo

Filmurin um heimsmálini skal vera stuttur - í mesta lagi 7 minuttir. Stuttfilmurin skal vera klárur at brúka til endamálið, sum er at upplýsa um heimsmálini. Minnist til, at tosa ella spæla næmingarnir sjálvir í filminum, skal loyvi gevast frá foreldrum ella verja, um næmingarnir ikki eru myndugir.
Filmurin verður gjørdur sum partur av undirvísingini undir leiðslu av læraranum, sum hevur flokkin.
Mælt verður til, at flokkurin arbeiðir saman. Hetta kann til dømis vera ein verkætlanaruppgáva, har filmurin er úrslitið.

Eru spurningar ber til at spyrja seg fyri á:



filmskapping@nam.fo
ella hjá
Árna Øregaard, tel.: 555179

